ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
110 Tórshavn

20. desember 2019
Mál: 19/01001-2
Tygara Skriv:
Viðgjørt:

Sirið Stenberg
løgtingsmaður

Nr. 27/2019

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um tænastur til fólk millum 18 og 67 ár frá almannaverkinum, settur landsstýrismanninum í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvørjar tænastur hevur Almannaverkið at bjóða til heimabúgvandi fólk millum 18 og 67?
2. Hvussu eru tænasturnar býttar út á økini í landinum?
3. Hussu nógv fólk millum 18 og 67 fáa tænastu frá Almannaverkinum?
4. Hvussu er tænastan býtt á tal á fólki í ymisku økjunum ?
5. Eru tað bíðilistar til tænastu frá Almannaverkinum og um so er hvørjir ?

Svar

Til nr. 1

Tænastur, sum Almannaverkið veitir heimabúgvandi borgarum millum 18 og 67 ár, eru skipaðar sambært forsorgarlógini. Endamálið við tænastunum er at stuðla borgarum, sum bera brek, at luttaka á jøvnum føti við onnur í samfelagnum og at slóða fyri, at borgarin fær eitt so sjálvstøðugt, støðugt og innihaldsríkt lív sum gjørligt.

Tænasturnar verða tillagaðar einstaka borgaran umframt at ávísar tænastur eru ætlaðar maka/hjúnafelaga, foreldrum ella øðrum avvarðandi.

Onkur tænasta er skipað sum ein til ein stuðul, har borgarin hevur tilknýti til eitt starvsfólk eitt ávíst tímatal um vikuna, meðan aðrar verða skipaðar í toymum.

Stuðulstænasta
Stuðulstænastan fyri vaksin er skipað sambært § 32 b í forsorgarlógini. Skipanin er stovnsett fyri at stuðla heimabúgvandi borgarum millum 18 - 66 ár, sum eru rørslutarnaðir ella hava avmarkaðan sálarligan førleika, so at hesi hava møguleika at liva eitt sjálvstøðugt og virkið lív. Stuðulin kann halda áfram eftir, at borgarin er vorðin 67 ár, um viðkomandi framvegis fær gagn av stuðlinum og hevur møguleika at liva eitt sjálvstøðugt og virkið lív.

Stuðulstænasta kann veitast til fylgi, eftiransni, vøku, umsorgan og sosialpedagogiska hjálp, og er ætlað persónum, ið liva eitt lív við einum ávísum virksemi, ið krevur stuðul eitt ávíst tímatal, og kann hetta virksemið vera bæði í heiminum og uttan fyri heimið. Í serligum førum kunnu borgarar fáa fastar persónligar hjálparar, hvørs uppgávur fevna um praktiska hjálp, fylgjarauppgávur o.a.

Samanumtikið fevna stuðulstænastur um eina røð av fjølbroyttum tænastum, sum ikki eru beinleiðis ásettar í forsorgarlógini. Tænasturnar eru stovnsettar yvir tíð, skipaðar eftir tørvinum í samfelagnum og fíggjarorkuni hjá Almannaverkinum.

Virknistænasta:
Virknistænasta er skipað sambært § 30 í forsorgarlógini og hevur til endamáls at geva borgarum møguleika at varðveita ella betra um persónligar førleikar ella lívskor við at arbeiða.

Virknistænastur eru høvuðsheitum ætlað persónum, sum eru millum 18 og 66 ár, eru fyrtíðarpensjónistar og hava so týðandi skert likamligt ella sálarligt virkisføri, at vanligi arbeiðsmarknaðurin ella fyriskipanir sambært lógini um arbeiðsfremjandi tiltøk ikki megna at veita hesum borgarum neyðugar karmar og stuðul til at megna eitt arbeiði á jøvnum føti við onnur. Virknistænasta kann halda áfram eftir, at borgarin er vorðin 67 ár.

Virknistænastur fevna um vard verkstøð, verkhús og tilhaldsstøð og kunnu eisini skipast sum sjálvhjálparbólkar og ráðgeving.

Endurvenjing.
Endurvenjing er skipað sambært § 29 í forsorgarlógini og verður veitt persónum í aldrinum 18 til 66 ár. Endamálið við endurvenjingini er at hjálpa borgaranum út aftur á arbeiðsmarknaðin ella gera hann føra fyri at klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá Almannaverkinum.

Endurvenjingin í Almannaverkinum er skipað í tvey toymi av terapeutum.

Toymið í Runavík fevnir um borgarar úr Norðoyggjum, Eysturoy og Sundalagnum. Toymið í Tórshavn fevnir um borgarar úr Vágoy, Norðstreymi, Suðurstreymi, Sandoy og Suðuroy.

Upplýsast skal, at Almannaverkið ikki veitir viðlíkahaldsvenjing. Í uppskotinum til vælferðarlóg er heimild fyri at veita viðlíkahaldsvenjing og um lógin verður samtykt verður farið undir stig og miðvíst at upp- og útbyggja viðlíkahaldsvenjing í Almannaverkinum

Umlætting
Almannaverkið veitir eisini umlætting, sum hevur til endamáls at lætta um hjá hjúnafelaga/maka, foreldrum ella øðrum avvarðandi, sum eru umsorgarnarpersónar hjá borgara, sum hevur likamligt, sálarligt brek ella sosialar trupulleikar.

Umlættingin fer fyri tað mesta fram á umlættingarstovnum, sum eru skipaðir kring landið. Tó er eisini møguleiki at fáa dagumlætting í ella uttanfyri heimið.

Onnur tilboð
Veristøð

Almannaverkið hevur tilboð, eitt nú veristøð um landið, har skráseting av borgarum ikki fer fram. Tó verður talið av borgarum, ið ganga á veristøðum talt javnan. Umleið 150 borgarar gera regluliga brúk av hesum tilboðum.

Til nr. 2

Talva 1.

Talvan niðanfyri vísir tal av tænastum skift á slag av tænastu og landafrøðilig øki.

	Eysturoy	Norðoyggjar	Sandoy	Streymoy	Suðuroy	Vágoy	Íalt
Stuðulstænasta	44	26	5	129	10	14	228
Virknistænasta	7	6	1	15	6	6	41
Umlætting	8	2	4	21	0	0	35
Endurvenjing	14	13	2	20	2	5	56
íalt	73	47	12	185	18	25	360

Tølini eru frá november 2019.

Til nr. 3

Tað eru 316 heimabúgvandi fólk millum 18 – 67 ár, sum fáa tænastu frá Almannaverkinum.

Talva 3

Talvan niðanfyri vísir tal av tænastum skift á tal av fólki í landafrøðiligu økjunum og skift á prosentvísa býtið í landafrøðiligu økjunum.

Øki/fólkatal	Fólkatal 18-67 ár	Tænastur til heimabúgvandi millum 18 - 67	Tal av heimabúgvandi borgarum millum 18-67 ár, sum fáa tænastu	Tænastur til heimabúgvandi millum 18-67 ár í mun til fólkatal millum 18-67 ár
Eysturoy	6860	73	64	1,2 %
Norðoyggjar	3693	47	45	1,3%
Sandoy	712	12	8	1,7 %
Streymoy	14780	185	159	1,3%
Suðuroy	2645	18	16	0,7%
Vágoy	1877	25	24	1,3%

Tølini eru frá november 2019.

Til nr. 5

Ja, tað eru bíðilistar til tænastur frá Almannaverkinum. Samanlagt eru 38 borgarar ímillum 18-67 ár á bíðilista til 55 tænastur. Harumframt eru 159 borgarar á bíðilista til fyribils ella varandi búpláss.

Talva 4

Talvan niðanfyri vísir talið av tænastum, ið bíðilisti er til.

Stuðulstænasta	20
Virknistænasta	9
Umlætting	8
Endurvenjing	18
íalt	55

Tølini eru frá november 2019.

Talva 5

Talvan niðanfyri vísir talið av tænastum, ið bíðilisti er til skift á landafrøðilig øki.

	Eysturoy	Norðoyggjar	Sandoy	Streymoy	Suðuroy	Vágoy	Útland	íalt
Stuðulstænasta	10	2	0	8	0	0	0	20
Virknistænasta	2	3	0	3	0	0	1	9
Umlætting	1	0	0	5	2	0	0	8
Endurvenjing	8	2	1	7	0	0	0	18

Tølini eru frá november 2019.

*Fyri allar talvunar omanfyri er galdandi, at borgarin er skrásettur har hann **býr** í landinum og ikki hvar í landinum, hann fær veitt tænastu.*

Sjálvsognarstovnar

Almannaverkið hevur ikki skrásettan bíðilista til tænastur frá sjálvsognarstovnum sum veita umlætting.

.